UTTAN ÚR HEIMI

## Langt á mál

Herfyri ávaraði stjórin í Heimsbankanum Vesturheimin um, at tað fer at fáa álvarssamar avleiðingar, gera tey ríku londini ikki meiri fyri at beina fyri fátækradøminum kring heimin.

Men sambært bretska fíggjarmálaráðharranum, Gordon Brown, er langt á mál. Á einari ráðstevnu í London mánadagin segði hann, at verður ikki størri dentur lagdur á bardagan ímóti fátækradøminum, fer tað at taka 150 ár, áðrenn tað er burturi. Tað upprunaliga málið um at skerja fátækradømið niður í helvt innan 2015 krevur nakað heilt annað enn tað, sum nú verður gjørt, segði Gordon Brown.

– Eg eri bangin fyri, at vit verða sitandi framman fyri sjónvarpinum, har vit fara at síggja børn doyggja á skíggjanum. Vit verða ættarliðið, sum sveik okkara egnu hjørtu, segði Gordon Brown á ráðstevnuni. Hann heitti samstundis á leiðararnar í teimum ríku londunum um at tvíhalda stuðulin til tey fátæku londini kring heimin.

## Loysir seg at fara frá

Danskir fjølmiðlar hava í seinastuni gjørt nógv burtur úr samsýningini, sum formenninir í summum fakfeløgum fáa, tá teir fara frá. Í tí eina førinum bleiv umrøðan so stór, at ein fráfarin formaður valdi at rinda felagnum peningin aftur.

Í gjár visti Jyllandsposturin at siga, at forkvinnan í sjúkrasystrafelagnum, Connie Kruckow, fær heilar 807.990 krónur, um hon ger av at fara úr formansstarvinum. Skipanin hjá sjúkrasystrafelagnum er, at formaðurin fær tvær mánaðarlønir í fráfaringarsamsýning fyri hvørt árið, hon er formaður. Connie Kruzkow hevur verið formaður hjá donsku sjúkrasystrunum í góð 10 ár.

Umframt sjúkrasystrafelagið hava eitt nú lærarafelagið, kristiliga fakfelagið og fakfelagið hjá almennum starvsfólki eina slíka fráfaringarsamsýning.

## Fekk 16 ára fongsul

Ein afghani, sum særdi tveir norskar hermenn uttan fyri Kabul í fjør, hevur nú fingið sekstan ára fongsul fyri gerðina.

Mohammed Ibrahim var hermaður hjá gamla Taliban-stýrinum í Afghanistan. Tann 13. mai í fjør kom hann fram á tveir norskar hermenn í einari bygd stutt frá høvuðsstaðnum Kabul. Hann lat fleiri skot av ímóti teimum báðum hermonnunum og særdi báðar. Stutt eftir varð maðurin tikin.

Hóast Mohammed Ibrahim hevur fingið sekstan ára fongsul, vil ákæruvaldið ikki góðtaka dómin og hevur tí skotið hann inn fyri ein hægri rætt. Ákæruvaldið vísir á, at Noreg er eitt sokallað "vinarliga sinnað land", og at afghanin er fyrrverandi Taliban-hermaður. Tí eigur hann at fáa harðari revsing, heldur ákæruvaldið. Hesum taka teir báðir særdu norsku hermenninir ikki undir við. Teir halda, at maðurin hevur fingið nóg harða revsing.

## Kanska eitt víkingaskip

Tveir menn hava funnið fleiri silvurmyntir, partar av einum svørði og einum skjøldri í jørðini í Yorkshire í Onglandi, og nú verður gitt, at hetta kanska er eitt víkingaskip ella ein víkingagrøv.

Fleiri víkingagravir eru funnar í Skotlandi og Írlandi fyrr, men hetta er tað fyrsta fundið av sínum slagi í Onglandi, skrivar NTB. Simon Holmes, fornfrøðingur hjá Yorkshire Museum, sigur við The Guardian, at er hetta veruliga eitt víkingaskip, er talan um tað týdningarmesta víkingafundið á Bretsku Oyggjunum nakrantíð. Kanningar hava longu víst, at teir funnu lutirnir stava frá 9. øld, og sambært Simon Holmes vita fornfrøðingar og søgufrøðingar lítið um tað, sum víkingarnir høvdust at í Onglandi tá.

Norskir og danskir víkingar fóru á sínar fyrstu ránsferðir til Onglands í 9. øld, og fleiri handilsmenn úr hesum londunum búsettust har.

# Teir verða helst ongantíð revsaðir



*Radovan Karadzic og Ratko Mladic verða helst ongantíð revsaðir fyri krígsbrotsverk*

**Alt bendir á, at teir báðir ringastu krígsbrotsmenninir frá krígnum á Balkan sleppa undan revsing**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Slobodan Milosevic situr fangi í Haag, men sjálvt um hann verður funnin sekur í krígsbrotsverkum, bendir alt á, at teir báðir herviligastu brotsmenninir frá krígnum á Balkan í nítiárunum sleppa undan revsing.

Í átta ár hava NATO-hermenn leitað eftir teimum báðum Radovan Karadzic og Ratko Mladic, men uttan úrslit. Hildið verður, at teir hava fjalt seg í Bosnia, men fyri nøkrum døgum síðani segði høvuðsákærin í Haag, Carla del Ponte, at teir báðir eftir øllum at døma eru í Serbia nú. Sambært ákæranum fjala umleið 15 krígsbrotsmenn seg í Serbia.

Og haðani fáast teir neyvan, tí serbisku myndugleikarnir hava víst lítlan áhuga fyri at hjálpa dómstólinum. Sambært Carlu del Ponte hevur Radovan Karadzic nú búsett seg í sjálvum høvuðsstaðnum Beograd.

Um eitt lítið ár fara NATO-hermenninir av Balkan, tí tá yvirtekur ES eftirlitið har. Spurningurin er so, um ES kann leggja nakað trýst á serbisku myndugleikarnar fyri at fáa teir at útflýggja Karadzic og Mladic. ES royndi í fjør, tá Kroatia bað um limaskap í samveldinum. Tá kravdi Bruxelles, at kroatisku myndugleikarnir skulu útflýggja tann eftirlýsta generalin Ante Gotovina, sum er skuldsettur fyri krígsbrotsverk, men enn er einki hent. Kanska tí at generalurin framvegis verður mettur sum tjóðarhetja í heimlandinum.

# 4450 prestar skuldsettir fyri ágang ímóti børnum

**Ein kanning avdúkar, at síðani 1950 eru 4450 katólskir prestar í USA eru skuldsettir fyri kynsligan ágang ímóti børnum**

KYNSLIGUR ÁGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Hóast tann nýggja kanningin ikki verður almenn fyrr enn tann 27. februar, hevur sjónvarpið CNN longu fingið fatur á henni. Har kemur fram, at síðani 1950 hava børn skuldsett prestar fyri kynsligan ágang í meiri enn 11.000 førum.

Teir flestu av teimum 4.450 prestunum vórðu skuldsettir fyri at hava gjørt seg inn á barn í einum einstøkum føri. Meiri enn 1.100 prestar vórðu skuldsettir fyri at hava gjørt seg inn á børn tvær ella tríggjar ferðir, og 578 prestar vórðu skuldsettir fyri kynsligan ágang í meiri enn tíggju førum, sigur CNN.

Kanningin vísir eisini, at í 6.700 førum bleiv tað prógvað, at skuldsetingarnar vóru rættar, í 1.000 førum kundi hetta ikki prógvast, og tær seinastu 3.300 skuldsetingarnar vórðu ongantíð kannaðar, tí hesir prestarnir vóru ikki á lívi longur.

Katólsku biskuparnir í USA hava sýtt fyri at gera viðmerkingar til kanningina, sum prestafelagið sjálvt hevur latið gera.

# ítróttur

Nr. 33 • mikudagur • 18. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 381 | 348 | 33 | 13 |
| 2 | Neistin | 3 | 3 - 0 - 0 | 378 | 333 | 35 | 11 |
| 3 | StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 316 | 307 | 9 | 9 |
| 4 | VÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 345 | 326 | 19 | 8 |
| 5 | KÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 314 | 375 | -51 | 5 |
| 6 | H71 | 3 | 1 - 0 - 2 | 314 | 359 | -45 | 4 |

# Spenningur til síðsta sekund

**Um neistamenn ætla sær at gerast føroyameistarar í ár, so er neyðugt hjá teimum at spæla munandi betur enn teir gjørdu í hoyvíkshøllini mánakvøldið, tá ið tær vitjaðu KÍF, ið var ógvuliga nær við at taka stig frá Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Uttan at taka nakað frá kollfirðingum, so vóru tað neyvan nógv, ið høvdu væntað ein javnan og spennandi dyst, tá ið KÍF og Neistin hittust í Hoyvík mánakvøldið. Neistaliðið hevur seinastu umførini verið ógvuliga sannførandi, og nógv hondbóltskøn hava teir bláu úr Havn sum favorittar til at vinna meistaraheitið. Men kollfirðingar góvu ikki skarvin yvir uttan víðari, og dysturin kundi eins væl endað javnur, men tíverri fyri kollfirðingar vann Neistin við tí eina málinum.



*Tað eydnaðist Karl Oddmari Rasmussen og hinum í Neistanum við stríði og strevi at basa Damir Oros og KÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Feilir í hópatal

Lat tað verða sagt beinan vegin. Dysturin mánakvøldið var javnur og spennandi, men so er alt sagt, tí sjálvt hondbóltsspælið var als ikki nakað at rópa hurrá fyri. Um onkur hevur ætlanir um at gera eina bók um óneyðugar feilir og bólttap í hondbólti, so skuldi viðkomandi verið til dystin í Hoyvík, tí har var nógv tilfar til eina slíka bók at heinta.

Serliga í byrjanini av dystinum var leikferðin sera høg, og bæði liðini royndu at gera sera skjótt av við at koma í álop. Hetta gjørdi, at tað til tíðir gekk ov skjótt fyri seg, og bóltar endaðu antin uttan fyri vøllin ella hjá einum mótstøðumanni. Serliga tær longu avleveringarnar úr verju í álop miseydnaðust oftari enn tær eydnaðust.

### Munur á monnum

Hesi bæði liðini, ið hittust í Hoyvík mánakvøldið, KÍF og Neistin, eru óivað eisini minstu og størstu lið í heimligu kappingini. Leikararnir hjá KÍF eru ikki av størstu monnum, um sæð verður burtur frá Damir Oros, meðan Neistin hevur nógvar høgar og vælvaksnar mans á liðnum. Tað sá tó ikki út til at ávirka kollfirðingar stórvegis, tí teir lupu í krovið á stóru neistamonnunum beinan vegin, og tað var týðuligt, at hetta hóvaði ikki havnarmonnum.

Ein av mest týðandi leikarunum hjá KÍF er málverjin, Óla Kristian Djurhuus, og hann fekk ikki bestu byrjanina upp á dystin móti neistamonnum. Minni enn tríggir minuttir vóru leiktir, tá ið hann fekk eitt brandskot frá Dragisa Stojovic beint í skortin, og tað tók eina góða løtu, áðrenn hann reistist aftur. Hetta tóktist tó ikki at nerva Óla Kristian stórvegis, tí hann spældi ein fínan fyrra hálvleik.

Tað var ongantíð tann stóri munurin á liðunum í dystinum. Sjáldan vóru meiri enn tvey mál á muni, og í fyrra hálvleiki var tað næstan altíð heimaliðið KÍF, ið hevði leiðsluna, um tað ikki stóð á jøvnum. Í álopinum hjá kollfirðingum lá væl fyri hjá Damir Oros at spæla Gert Hansen á strikuni leysan, og neistamenninir høvdu als ikki fatur á Gert bróðurpartin av dystinum. Í hinum endanum vardu kollfirðingar 5-1 við Rógva Weihe frammi á Áka Mørk, og út á vonginum skermaði Teitur hjá KÍF fyri tí toppskjúttan hjá Neistanum, Blagoje Buha, so at ikki bar til at avlevera til hann. Buha kom ongantíð fyri seg í dystinum, og tað sigur ikki so lítið, at hann einans fekk tvey mál í dystinum.

Neistamenninir høvdu sum sagt stórar trupulleikar við at fáa álopið hjá sær at koyra, og tá ið tað so eydnaðist teimum at spæla seg ígjøgnum, vóru menn alt ov óneyvir. Serliga vóru tað vengurnir, ið misnýttu opnar møguleikar. Hinvegin vóru neistamenn dugnaligir, tá ið teir vóru ein mann minni miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tí teir báðar minuttirnar vunnu teir bláklæddu 3-1.

Sum áðurnevt var lítil munur á liðunum báðum, og tá ið komið var til hálvleiks, vóru tað kollfirðingar, ið vóru á odda við tí eina málinum 16-15. Neistamenn høvdu møguleikan at javna stutt fyri steðgin, men Heini Hanusarson brendi brotskasti móti sínum bygdarfeløgum.

### Nógvur dramatikkur

Seinni hálvleikur var eins javnur og spennandi sum tann fyrri. Liðini fylgdust at kalla allatíðina, men tá ið Neistin kom á odda við trimum málum um miðjan hálvleik, hildu tey flestu, at nú var dysturin avgjørdur, men so var ikki. Kollfirðingar hingu í, og teir fingu eisini góða hjálp frá neistamonnum, ið ikki gjørdu tað lættari fyri seg sjálvar. Millum annað gjørdi Jotic í neistamálinum tvær ferðir í rað tann stóra brølara, at hann drálaði alt ov leingi við at koyra bóltin aftur í spæl, eftir at KÍF hevði skorað. Hetta gjørdi, at tá ið liðfelagar hansara fingu bóltin niðan á miðjuna, høvdu dómararnir báðir, púra rætt, hondina uppi og markerað fyri nøl. Hetta kostaði neistamonnum dýrt, og málverjin var ikki júst keisarans vinur hesa løtuna.

Tíbetur fyri neistamenn vóru kollfirðingar ikki serliga neyvir í seinna hálvleiki, og millum annað misnýttu teir trý brotskøst eftir steðgin. Tað skal tó nevnast, at strikuspælarin hjá KÍF, Gert Hansen, var framúr eftir steðgin og næstan einsamallur helt teimum inni í dystinum. Ferð aftaná ferð fangaði hann returbóltar, ið hann síðani langaði í kassan.

Endin á dystinum gjørdist ikki sørt dramatiskur. Neistin kom á odda bæði 30-27 og 31-28 við tveimum stak góðum málum frá Birgiri Kass, og bert fýra minuttir vóru eftir at leika, og tá ið Áki Mørk legði Neistan á odda 32-29 góðar tveir minuttir fyri leiklok, byrjaðu onkrir áskoðarar at rýma. Men so minkaði Teitur Joensen um munin fyri KÍF til 30-32, og stutt eftir kom ein nógv umtalað hending. Neistamenn vóru í álopi, og teir missa bólt, men í somu løtu fær dómaraborðið grøna time-out kortið frá neistabonkinum, og lúðurin ljóðar. Tá høvdu kollfirðingar vunnið bóltin, og ein av leikarunum hjá teimum var púra leysur ávegis neistamálinum. Ein upplagdur málmøguleiki var tikin frá KÍF, men neistamenn høvdu sum so einki skeivt gjørt. Dómararnir báðir, Hannis og Uni Wardum, snakkaðu sínamillum, og teir avgjørdu at geva KÍF brotskast. Hetta vóru neistamenn sjálvsagt ikki fegnir um, men tað var einki at gera við tað. Sosialurin spurgdi beint eftir dystin umboð fyri dómarafelagið um tilburðin, og har var sagt, at tilburðurin var so sjáldsamur, men at rættast var at geva KÍF brotskast. Tað skal viðmerkjast, at umboðið fyri dómarafelagið ikki visti framman undan fyrispurninginum, hvat ið dømt bleiv. Damir skoraði upp á brotskasti, og so var 31-32! Neistamenn fóru í álop, og tá ið klokkan vísti 29:03 fingu teir brotskast, sum Áki Mørk setti í netið til 31-33. KÍF fór beint aftur í álop og hóast teir vóru ein mann minni, fekk Damir minkað til 32-33. Hálvur minuttur var eftir, og neistamenn høvdu aftur bóltin, men teir mistu hann tí dømt var fyri, at bólturin kom í beinið á Heina. Kollfirðingar fingu tí enn ein møguleika, sum teir tó misnýttu, men so gjørdi Áki Mørk seg inn á ein kollfirðing og fekk tveir minuttir, og samstundis fekk KÍF trý-metur kast og tíggju sekund vóru eftir á klokkuni. Hvussu teir bóru seg at við at gera dribl, tá ið teir skuldu leggja upp til Damir, er ilt at siga, men tað var reinur kleyvarskapur, tí teir høvdu ein gyltan møguleika at javna, men ístaðin fingu neistamenn bóltin og lótu tíðina ganga út, og harvið vann havnarliðið 33-32 eftir ein sera dramatiskan enda á dystinum.

### KÍF-Neistin 32-33 (16-15)

KÍF: Gert Hansen 8, Damir Oros 8(1), Regin Petersen 7, Teitur Joensen 4(1), Rógvi Weihe 3, Petur Martin Poulsen 2

Neistin: Áki Mørk 10(2), Heini Hanusarson 6, Ragnar Stakksund 4, Dragisa Stojovic 4, Helgi Justinussen 3, Birgir Kass 2, Blagoje Buha 2, Karl Oddmar Rasmussen 2

Útvísingar: KÍF 3, Neistin 7

Brotskøst: KÍF 6(3), Neistin 4(2)

Dómarar: Hannis og Uni Wardum – hildu linjuna í rótuta dystinum, og nógv umtalaðu avgerðirnar móti endanum á dystinum vóru óivað rættar